# TÍÐINDI
# FRÁ
# RUNAVÍKAR KOMMUNUSKÚLA




***Hesir tríggir eru sælandsmeistarar í bogaskjóting.***
***Kaj vann silvur, Súnfríður vann gull og Kristoffur vann bronsu.***

**Mars 2005**

**Inngangur.**

Páskirnar nærkast, og tað boðar okkum frá, at skúlaárið er liðið so mikið, at endaspurturin er um at byrja. Páskaroyndin hevur verið, og fyrstu fyrireikingarnar til próvtøkuna eru gjørdar. Uppgevilsini eru latin inn, og næmingarnir hava meldað seg til próvtøkuna. Vónandi fáa vit ein góðan enda uppá skúlaárið 2004/2005.

Vanliga varð roknað við, at tíðin frá jólum til páskar er effektivasta tíðin til innlæring. Hetta er ikki galdandi meir. Skúlanum er álagt so nógvar ymiskar aktivitetir, sum skulu vera í 9. og 10 flokki, at trupult er at fáa nakra samanhangandi undirvísingarperiodu. Nevnast kann, at hesir árgangirnir skulu 14 dagar í starvsvenjing, og teir skulu gera eina verkætlanaruppgávu, sum fer við 8 døgum. 9. flokkur skal 1 dag á vitjan hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd og 1 dag skulu tey vitja SEV. Í ár hava tannrøktararnir eisini verið á vitjan.

**Trivnaðurin á skúlanum.**

Fyrsta treytin fyri, at ein næmingur fær nakað burtur úr síni skúlatíð, bæði tá talan er um innlæring, og tá talan er um sosiala menning, er at næmingurin trívist. Tí er trivnaðurin á skúlanum eisini frammalaga, tá skúlaviðurskifti verða umrødd.

Trivnaðurin í føroysku skúlunum hevur eisini verið evnið í føroysku fjølmiðlunum seinastu tíðina. Vit fáa at vita, at næmingarnir eta alt ov ósunt, og at teir drekka ov nógv sodavatn, og vit fáa at vita, at hetta er skaðiligt fyri heilsuna, og at tað er oyðileggjandi fyri tenninar. Fokus er sett á m.a. matvanarnar hjá børnunum – hvat er í matpakkanum, um tey hava nakran, og hava tey etið morgunmat, áðrenn tey koma í skúla? Ger skúlin nóg mikið, fyri at næmingarnir kunnu njóta sín matpakka, og átti skúlin kanska at givið næmingunum møguleikan at keypa sær frukt ella ein matpakka (skúlabreyð) á skúlanum á sama hátt, sum teir í dag kunnu keypa mjólk?

Øll kunnu skjótt verða samd um, at næmingarnir í framhaldsdeildini eta alt ov ósunt. Bert heilt fáir hava matpakka við, og vit síggja, hvussu nógv verður keypt í fríkorterunum allan dagin, hóast næmingarnir – sambart skúlans reglum – ikki hava loyvi til at fara út um skúlans øki. Sum skúli mugu vit viðganga, at vit ikki megna at steðga keypingini. Vit heita á og ávara, men tað er næmingurin, sum avger, um hann vil lurta og taka ávaringina til eftirtektar. Her er neyðugt, at allar góðar kreftir seta seg saman fyri at finna eitt alternativ til keypingina. Lærarin ávarar, heilsusysturin ávarar, og tannlæknin ávarar.

Í hesum sambandi kann nevnast, at støðan hjá næmingunum í 10. flokki, sum hava verið hjá tann-lækna í ár, er út av lagi vánalig. Næmingarnir høvdu 3 hol í tonnu-num í miðal. Fyri at fyribyrgja at tað sama skal endurtaka seg, hava 9. flokkarnir havt vitjan av tann-røktarunum fyri at gera eina roynd at greiða teimum ungu frá, hvønn skaða tey gera sær sjálvum við at eta ósunt og drekka sodavatn allan dagin.

Reglur finnast (rundskriv) sum siga, hvussu umstøðurnar á skúla-num eiga at vera í samband við matarsteðgin hjá næmingunum. Okkara skúli livir ikki upp til krøvini, sum vera sett í rundskrivi-num, men sum nevnt í seinasta blaði, so hevur skúlastýrið sett sær fyri at gera nakað fyri at bøta um umstøðurnar. Tað hevur í skrivi heitt á kommununa um at seta vatnautomatir upp á skúlunum. Hetta hevði í øllum føri verið eitt stig rætta vegin.

Skulu næmingarnir fáa møguleik-an at keypa sær frukt ella matpak-kan á skúlanum, so setir hetta heilt onnur krøv. Neyðugt verður at seta fólk til at avheinta matin, og til at fáa hann út til teir røttu næm-ingarnar. Fleiri hava helst ta á-skoðan, at matpakkin framvegis eigur at vera ábyrgdarøki hjá foreldrunum. Soleiðis átti tað at verið, men spurningurin er, um vit ikki við hesum lata eyguni aftur fyri veruleikanum – og kunnu vit tað?

**Útiøkini uttan um skúlarnar.**

Tá trivaðurin hjá næmingunum verður umrøddur, verða sosialu viðurskiftini á skúlanum raðfest frammalaga. Hvussu kunnu vit fyribyrgja happing, og hvussu kunnu vit fáa allar næmingarnar við í spælið í fríkorterunum.

Heilt at fyribyrgja happing verður helst trupult, og at fáa allar næm-ingarnar at luttaka í sosialum aktivitetum verður eisini trupult. Ein fyritreyt er at vit hava nakað at bjóða næmingunum í fríkorter-unum – tað veri seg bæði inni og úti. Betri umstøðurnar eru til spæl, minni verður tíðin og áhugin til happing og negativar aktivitetir.

Seinasta vár vórðu umstøðurnar í skúlagarðinum í Rituvík bøttar munandi, og hevur hetta verið til gleði fyri næmingarnar har. Ein ætlan er eisini gjørd fyri skúla-garðin í Søldarfirði og á Glyvrum. Arbeiðið í Søldarfirði byrjaði seinasta heyst, men steðgaði upp, tá veðrið versnaði. Vónandi verð-ur tað gjørt liðugt í vár.

Peningur var eisini játtaður til at gera ábøtur á útiøkið á Glyvrum, men tá tað gjørdist greitt, at onki kom at vera gjørt fyribils, valdu fyrireikararnir at nýta peningin til mennandi spøl inni. Peningurin rakk til eitt borðtennisborð, 2 fót-bóltspøl og 2 airhockyespøl.

Spurt kann vera um nøkur sosial menning liggur í slíkum spølum. Jú, sum fyrireikararnir hava skip-að tað, so er tað mennandi fyri næmingarnar. Fyrst og fremst eru

næmingarnir glaðir fyri spølini. Teir eru noyddir til at fylgja einum ávísum skema, soleiðis, at um teirra flokkur ikki eigur pláss við spælið, so mugu teir góðtaka, at teir mugu víkja. Teir mugu spæla saman, og spølini eru motoriskt mennandi.

**Bogaskjúttar.**
Tað er altíð hugaligt at frætta í fjølmiðlunum, at tað gongst okkara næmingum væl, og at teir klára seg væl í kapping við javnlíkar – so er tað líka mikið, um tað er í ítrótti ella í aðrar mátar – og vit eiga nógv góð ítróttarfólk. Ein ítróttargrein, sum fleiri av okkara næmingum hava klárað seg væl í er bogaskjóting, og aftur í ár hava 3 dreingir – Kaj Johannesen, 8.A, og Súnfríður Jacobsen og Kristoffur Andreassen, 7.B, verið í Danmark í kapping um Sjællandsmeistaraheiti, og vunnu teir gull. Slík úrslit fáast bert við at luttakararnir hava evnir og venja miðvíst. Tillukku við góða úrslitinum.

**5. flokkarnir.**
Eisini 5. flokkarnir hava klárað seg væl í eini kapping í fimleiki, sum næmingar á læraraskúlanum hava skipað fyri. Teir vunnu sær rætt til at koma til Havnar á Læraraskúlan og saman við øðrum at vera við í ítróttatiltøkum sum læraraskúlanæmingar stóðu fyri í ein heilan dag. Teir og teirra fimleikalærarar høvdu ein frálíkan dag í Havn. Í kappingini gjørdust okkara næmingar nr. 2.

**Konsert.**
26. mai fáa næmingarnir í framhaldsdeildini og í 7. flokkunum saman við javnaldrunum á Toftum høvi til at koma á konsert hjá Berklee College Of Music, sum er eitt orkestur frá tónleikaskúlanum í Boston. Føroyingurin Bjarki Meitil er við í orkestrinum.

**Komandi skúlaár.**
Tímajáttanin til komandi skúlaár er komin. Ikki óvæntað, so er hon munandi lægri enn seinasta ár. Hetta kemst av, at næmingatalið við skúlan er lækkað, og tað kemur at lækka nøkur ár afturat. Árgangurin, sum kemur í skúla er uppá 45, meðan árgangurin, sum fer út, er uppá 60 næmingar. Hetta kemur at endurtaka seg í 3 ár afturat.
Tíverri er næmingatalið í 9. árgangi lækkað niður í 52. Sostatt hava vit bert fingið tímar játtaðar til 2 flokkar komandi skúlaár, og merkir hetta, at, um ikki onkur næmingur flytur til, so má ein av flokkunum deilast, og árgangurin verður bert 2 flokkar.

**Páskafrítíðin.**
Páskafrítíðin byrjar 19. mars, og vit fara aftur í skúla mikudagin 30. mars.
Øllum verður ynskt einar gleðiligar páskir.